# Loftar tú mær?

Rithøvundur og myndir: Rakel Helmsdal
(Føroyar) BFL, 2019
Tilnevnd barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2020

Søgugongd: Í søguni hitta vit trý systkin, sum hava mist langommuna. Lítlibeiggi, systir og stóribeiggi eru í garðinum. Vit eru við í tonkum og kenslum hjá børnunum um, hvussu deyðin ávirkar tey. Lítlibeiggi grætur ikki, men livir í løtuni. Systirin flýgur við dreka, og stóribeiggi, sum átti at ansað eftir sínum systkjum, syrgir og minnist langommuna.

Evni: Sorg, deyði, kenslur, systkin




ISBN 978-952-7490-05-1

## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES við teimum yngstu

**Hyggið at myndunum saman við barninum. Hvørjar áhugaverdar smálutir finna tit? Tosið um litir. Hyggið at trænum, finna tit eitt gamalt úthús úr træi? Hvørji djór finna tit?**

### TEY YNGRU

**1. Hygg at kápumyndini. Hvat heldur tú, bókin snýr seg um?**

**2. Hvørji munnu tey trý á kápumyndini vera?**

**3. Hvat gera tey?**

**4. Eigur tú systkin? Hvussu er at eiga systkin?**

### MIÐLINGAR

**1. Les bókina hart fyri teimum tvær ferðir. Fyrstu ferð uttan at vísa teimum kápumyndini ella myndirnar, og seinnu ferð verður lisið hart, meðan næmingarnir hyggja at myndynym. Tosið saman um lesiupplivingarnar.**

**2. Høvundurin hevur skapað figurar við tómum andlitum. Hvat heldur tú um tað? Hvat heldur tú, hon vil við tí?**

**3. Hugsa um huglagið í bókini. Hvat fær hon teg at hugsa um?**

**4. Systkini nevnast lítlibeiggi, systir og stóribeiggi. Hví heldur tú, at tey ikki hava nøvn?**

**5. Skriva eitt stutt bræv til onkran, sum tú hevur mist. Tað kann vera eitt húsdjór, onkur, sum er deyður, ella ein vinur ella vinkona, sum er flutt/ur.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat dámdi tær við bókini? Hvat dámdi tær ikki? Var nakað, ið tóktist trupult? Kennir tú nakað aftur úr øðrum søgum?**

**2. Hví heldur tú, bókin eitur *Loftar tú mær*?**

**3. Systkini syrgja á ymiskan hátt. Tosið í bólkum saman um, hvussu sorg kennist.**

**4. Hyggið at tekstinum. Hvussu er teksturin settur upp? Finna tit nøkur mynstur?**

**5. Høvundurin nýtir ervafrásjón í myndum sínum. Hvat heldur tú, at hon vil vísa við hesum?**

**6. Hvønn týdning hava krákurnar, hvíta dúgvan og gamla træið fyri søguna?**

**LES EISINI:**

*Vi är Lajon!* eftir Jens Mattsson og Jenny Lucander

MÁLBITIN

## "Sorg"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sorg | Sorg | Sorg | Sorg | Sorg | Aliasunneq | Suru | Moraš |



Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við #nordiskabokslukaren!